# Búskaparfrágreiðing

Várið 2011

# Fiskivinnan

## týðandi lykil at tryggja varandi búskaparvøkstur

## Óheftur stovnur skal regulera fiskiveiðuna

- Veiðitrýstið óforsvarliga høgt
    - Veiðitrýstið undir Føroyum hevur síðstu 15 árini verið umleið 50-70% hægri enn tað veiðitrýst, sum hevði givið mest búskaparliga og lívfrøðiliga
    - Havstovan mælir til at lækka fiskidagatalið 50%
    - Fiskidagarnir skerdir umleið 35%, síðani skipanin byrjaði - kortini stórur partur óbrúktur

- Heimliga fiskivinnan vánaligan rakstur í fleiri ár
    - Heimliga fiskivinnan og fiskavirkisvinnan sera trupult at fáa lønsemi

# Fiskivinnan

## týðandi lykil at tryggja varandi búskaparvøkstur

## Neyðugt grundleggjandi at broyta hvussu vit stýra okkara fiskivinnu

- Løgtingið eigur at áseta ein veiðisetning fyri fiskiveiðuna undir Føroyum

- Síðani skal óheftur stovnur áseta árliga fiskidagatalið

# Konjunkturstøðan 1

- Útlit til búskaparvøkstur í 2011 og nøkur ár fram
  - Vøksturin kemur frá:
    - frægari fiskiskapi eftir botnfiski undir Føroyum
    - vaksandi útflutningi av alifiski
    - privata nýtslan hækkar á eina meira vanliga legu
  - Hinvegin
    - tað almenna fer væntandi at tátta í fíggjarpolitiskt fyri at minka hallið í almenna geiranum
  - Tó trupult at meta um tí:
    - Eik Banki er í eini tilgongd við eigaraskifti
    - framleiðslan í fiskivinnuni í 2011 verður møguliga ávirkað av húsaganginum í Faroe Seafood
    - Ósemja er millum strandalondini um makrelfiskiskapin

# Fiskivinnan týðandi partur

| Inntøkur á gjaldsjavnanum, mió. kr. | | | | | | | | TALVA 2.1 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Høvuðsbólkar | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
| Vørur og tænastur | 4.719 | 4.398 | 4.224 | 4.410 | 4.905 | 5.224 | 5.628 | 5.220 |
| -Vørur | 4.261 | 3.938 | 3.707 | 3.618 | 3.869 | 4.057 | 4.346 | 4.098 |
| --Harav útflutningur av fiski og fiskavørum | 3.219 | 2.800 | 2.714 | 2.868 | 3.169 | 3.229 | 2.599 | 2.277 |
| -Tænastur | 458 | 460 | 517 | 792 | 1036 | 1167 | 1283 | 1122 |
| Inntøkuflytingar | 723 | 727 | 626 | 934 | 1036 | 1009 | 937 | 623 |
| Rakstrarflytingar | 912 | 871 | 908 | 913 | 977 | 1275 | 879 | 932 |
| Inntøkur úr útlondum tilsamans | 6.354 | 5.996 | 5.758 | 6.257 | 6.918 | 7.508 | 7.444 | 6.775 |

**Kelda:** Hagstova Føroya.

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Raksturin hjá heimaflotanum 1

Ársúrslit og úrslit áðrenn óvanligt fyri feskfiskaveiði | MYND 2.5




* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.

**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Miðalprísir á toski

Miðalprísir á toski 1 og toski 2 skrásettur í avreiðingarskipanini MYND 2.6




**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Raksturin hjá heimaflotanum 2

| Eginogn og skuld tilsamans í feskfiskaveiði, 1999-2010 | MYND 2.7 |
|---|---|




* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.

**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Raksturin innan fiskavirking

Ársúrslit, úrslit áðrenn óvanligt og skuld tilsamans, fiskavirking, 1999-2010 MYND 2.8




* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Heildarveiðan undir Føroyum

Heildarveiða, toskur, hýsa og upsi undir Føroyum og mett veiða 2010-2011 MYND 2.10




**Viðm.:** Tølini fyri 2010 og 2011 eru mett veiða av ICES.
**Kelda:** ICES, úr [9].

# Tilmæli

- Latið óheftan stovn regulera fiskiveiðuna undir Føroyum
  - Flytast úr politisku skipanini og í óheftan stovn
  - Løgtingið skal í staðin
    - áseta veiðisetning fyri fiskiveiðuna undir Føroyum, t.e. reglugerð fyri, hvussu nógv loyvt ella ráðiligt er at fiska úr fiskastovnum *(catch control rule)*
    - áseta ætlan um kravd stig fyri at verja stovnar, tey týdningarmiklastu fiskasløgini, har vandi er fyri, at teir ikki megna at endurnýggja seg

# Tilmæli

- Takið av stuðulsskipanir og forðingar
  - Takið av almennar stuðulsskipanir til fiskivinnuna
  - Strikið forðingar fyri kapping og fríari tillaging

- Lutið út nýggj rættindi á uppboði ella ásetið tilfeingisgjald
  - Byrjast kann at luta út rættindi eftir eini skipan við uppboðsølu til nýggjan fiskiskap, sum tekur seg upp
  - Í øðrum lagi kann tilfeingisgjald verða tikið fyri tær kvotur, ið verða lutaðar út